TING-HELLAN

# At kjakast á

TINGHELLUDEBATTIN

*Sámal Matras Kristiansen*
*samal@ruc.dk*



Føroyingar elska at kjakast. Føroyingar kjakast um alt møguligt; tað veri seg við náttúrðaborðið (eftir tíðindini sjálvandi), "undir vegginum", á gøtuni, niðri í neystinum, í telefonini, framman fyri sjónvarpsskuggan (um hvørja rás man skal hyggja eftir), við føðingardagsborðið tá familja og grannalag eru savnað, ella gjøgnum telefonina. Føroyingar (halda seg) duga at kjakast um alt, og um einki annað er at kjakast um, so ber til at kjakast um veðrið ella ódugnaligar politikarar.

Fólksligi almenningurin er fyltur við kjaki. Og borgarligi almenningurin somuleiðis. Politikarar kjakast á tingsins røðarapalli, í útvarpinum ella í bløðunum. Fólk skriva síður upp og síður niður við vreiðum lesarabrøvum og kronikkum. Alt ber til at kjakast um, og kjakast verður dúgliga, hóast flestu føroyingar halda seg til tað munnliga, tað beinleiðis kjakið, heldur enn at róta seg inn í skrivligar debattir, ið kunnu eftirkannast av framtíðini og lasta teg fyri tínar meiningar tú hevði "tá tú vart ungur og óvitugur".

Serliga nú á døgum er avbært. Skrivar tú okkurt í bløðini, verður tað lagt á ein databasa, sum framtíðarinnar føroyingar mega leita í. Tínar syndir verða ikki gloymdar. Hevur tú fest tínar meiningar á blað, so heftir tú fyri tí restina av lívinum. Tí er neyðugt at orða seg sakliga og skilagott. Hetta er ikki á sama hátt neyðugt tá tú førir munnligt kjak. Her verða tíni orð skjótt gloymd, og um onkur roynir at ákæra teg fyri tínar meiningar, kanst tú bara halda uppá, at "tað havi eg ongantíð sagt", ella "tú manst hava misskilt meg". Tí er grundleggjandi munur á munnligum og skrivligum kjaki. Kjakast tú beinleiðis við onkran, ið er í somu geografisku støðu sum tú, hevur tú møguleikan at bjarga einari óhepnari støðu við t.d. at nýta humor ella kanska beinleiðis vald, ið kann køva eina víðari tulking av tínum útsøgnum.

## Virtuelli almenningurin

Sum nevnt kann einhvør fara inn á greinasavnið hjá Sosialinum og leita upp hesa greinina við at skriva antin mítt navn ella onkur orð, ið hava við evnið at gera, t.d. "kjak". Leitiorðið "kjak" gevur í skrivandi stund 2417 greinar at leita ímillum, ið á ein ella annan hátt; í meiri ella minni mun snúgva seg um kjak. Í greinasavninum hjá Dimmalætting er samsvarandi talið 2455. Um ein vil vita eitt sindur (nógv) um kjakið í Føroyum hesi seinastu 7-8 árini, so eru greinasøvn av hesum slagi sera góð amboð at vinna sær eitt skjótt yvirlit yvir hetta tíðarskeiðið. Gamla mannagongdin við at leita í dagar og vikur á bókasavninum ella á skjalasavninum, í vón um at finna okkurt spennandi, er farin, um ikki man er søgufrøðingur og vil longur aftur í tíðina at granska. Nú er sjálvt bíblian løgd út á netið við leitifunktión, soleiðis at nærum hvør smádrongur kann finna sær bíbilsk skrivtstøð fram og seta tey í tað høpi, ið man hóva honum. Sannleikin verður nú funnin á netinum; ikki í lestrarbókini sum fyrr.

Men almenningurin strekkir seg víðari. Ikki einans eru borgarligi og fólksligi almenningurin umboðaðir á netinum - antin í lukkaðum ella hálvlukkaðum databasum, ella í opnum leitiskipanum sum "Google" ella "Yahoo". Tey seinastu tíggju árini er vorðin skaptur eitt slag av "virtuellum almenningi". Flest fólk kanna e-post minst fleiri ferðir um vikuna, og flestu yngru føroyingar hava helst roynt at "kjatta" á netinum, t.d. á "Vaksnamanna_chat", "Faroese_chat" ella "Jesus_chat", og harígjøgnum at skapa sambond og vinarbond, ið mangan kunnu gerast eins sterk og vóru tey skapt gjøgnum traditionella fólksliga almenningin í t.d. heimbygdini. Eg veit enntá dømi um at pør hava funnið saman á kjattinum og eru vorðin gift og hava fingið børn.

Eitt annað fyribrigdi, sum er tað henda greinin í grundini snýr seg um, er "kjakforumið". Vanliga fatanin av einum kjakforumi er t.d. løgtingið, har landins kosnu menn ("and women!!!") kjakast um mál, ið eru uppi í tíðini. Eisini hava út- og sjónvarpini altíð dugað væl at skipað fyri ymiskum kjaksendingum, har serliga "Fimmarin" hjá ÚF man vera tann kendasti. Saman við út- og sjónvarpingini av tingsins kjaki, er stórur partur av borgarliga almenninginum nú vorðin fjølmiðlaður. Øll hava møguleika at fylgja við í landsins viðurskiftum, og almenningurin er enntá víðkaður so mikið, at vit á okkara døgum mega tosa um ein "alheims almenning". Hetta varð seinast prógvað við umfatandi samkensluni og innsavningini til ofrini av flóðalduni í Suðurasiu um nýggjársleitið.

Eg havi áður nevnt fyribrigdini "e-post" og "kjatt". Bæði tvey eru framúr samskiftisamboð, serliga um hybridar sum t.d. "messenger" ella "ICQ" verða tiknir í nýtslu. Við hesum amboðum ber til at føra eitt intensivt samskifti við nógvar vinir og kenningar samstundis. Ein fær veruliga effektiviserað sín sosialitet á henda hátt. Man kann vera við í nógvum ymiskhættaðum projektum samstundis, eisini hóast hesi projektir t.d. eru í geografiskari fjarstøðu frá hvørjum øðrum.

Øll hesi tól hava tó tann vansa, at man noyðist at halda seg til meiri ella minni tveysom sambond. Sjálvandi ber til at senda út felagsmeylir, og eitt innlegg á kjattinum kann skapa respons frá nógvum síðum. Ein onnur avmarking her er tó, at samskiftið fer fram í "núinum". Samskiftið, ið verður framleitt, er í stóran mun ætlað at verða gagnnýtt beinanvegin - á sama hátt sum kjakið "undir vegginum" í føroysku markatalsbygdini verður framleitt og gagnnýtt í núinum, og harvið eisini mangan gerst sera humoristiskt. Tó kenni eg nógv, ið nýta meylin sum eitt slag av dagbók ella kalendara, ið sostatt er við til at stýra og planleggja gerandislívið. Óivað eisini ein nyttug funktión. Men tað ið veruliga er áhugavert við alnótini, er at til ber sum einstaklingur at røkka prinsipielt sæð óendaliga nógvum móttakarum við at leggja eitthvørt tilfar út á netið.

Hetta er ultimativa gagnið av internetinum: Við at leggja ting út á eitt opið system, verður tín "vøra" røkkilig fyri øll, ið skilja títt mál og tín hugsunarhátt. Um málið er føroyskt, avmarkar tað seg sjálvt, men um málið er enskt, so kann ein sangur, ein grein ella okkurt annað í prinsippinum verða lisið av miljardum her á jørðini. Ógvandi tanki!




## Ymisk føroysk kjakforum

Tað er her vit koma aftur til kjakið. Virtuelli almenningurin hevur hesi seinastu árini eisini boðið kjakinum vælkomnum undir sínar veingir. Nógvir hættir eru at kjakast á netinum. Fyri tað fyrsta hava ymiskt kjakforum ymiskhættaðar brúkaraflatar og ymiskar møguleikar og vansar. Fyri tað næsta er sosiala organiseringin av kjakforuminum avgerandi fyri undir hvørjum fyritreytum kjakið kann fara fram. Og fyri tað triðja kunnu kjakforum bæði lesast av tí absolutta almenninginum, ella kunnu tey einans verða lisin um tú hevur atgongdskodu til forumið, soleiðis at einans ein útvaldur almenningur fær lisið innleggini. Eg vil í restini av hesi grein geva dømi um nøkur føroysk kjakforum, ið eru sera ymisk á nógvar hættir, men sum øll eru opin fyri absolutta almenninginum, t.v.s. at tygum, ið lesa hesa grein beint nú mega fara ein túr út á netið og kanna og vurdera.

**www.uf.fo/zip** Eitt tað simplasta kjakforumið í føroysktmælta virtuella almenninginum er ZnikZnak hjá ungdómssend-ingini Zip hjá ÚF. Kjakið er serliga ætlað ungum, og hevur ein sera sprøklutan málburð. Kjakið er býtt upp í eitt ljósareytt gentukjak, har kjakast m.a. verður um dreingir, dildoir, tampax, útsjónd, hjartasorg og sjálvmorð, og eitt ljósablátt dreingjakjak, har kjakast m.a. verður um gentur, murtar, telduspøl og… jú mín sann, trúarmál. Tað er nærum ógjørligt at finna runt í ZnikZnak, og er man ein seriøsur kjakari, er hetta neyvan staðiÐ. Men um man gjarna vil umseta síni teenage-hormonir til ósamanhangandi setningar og smileys í hópatali, júmen so er ZnikZnak óivað tað rætta. Tann stóri trupulleikin hjá ZnikZnak er, at ein ikki noyðist at skráseta seg fyri at sleppa inn at kjakast. Hetta merkir m.a. at einhvør kann skriva tað honum lystir. Einasta verjan móti óhumsku er kjakansarin, ið skal royna at sletta tey fúlastu innleggini.